Álit

í

løgtingsmáli nr. 104/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um djóravælferð (Djóravælferðarlógin) (Nágreinað verður, at veiða og fiskveiða ikki er fevnd av løgtingslógini)

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur lagt málið fram 6. mai 2026, og eftir 1. viðgerð tann 8. mai 2026 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 11., 12. og 13. mai 2026.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Føroya Landfúta, Grindamannafelagið, landsstýrismannin í uttanríkis- og fiskivinnumálum, Bárð á Steig Nielsen, og landsstýrismannin í vinnumálum, Jacob Vestergaard.

Hóast tað ongantíð var ætlanin, at djóravælferðarlógin frá 30. apríl 2018 skuldi umfata veiðu og fiskiveiðu, undir hesum eisini grindadráp, sum eru regulerað í serligari veiðulóggávu, so eru partar, sum virka í føroyska samfelagnum, ið ikki tykjast hava hesa fatan.

Heilsufrøðiliga starvsstovan og ákæruvaldið hava innanhýsis metingar, at veiða – ítøkiliga tá grind verður hildin til – í ávísum førum skal metast eftir generellu djóraverndarlógini, heldur enn av serligu lóggávuni, sum hoyrir til veiðuna. Hetta hóast landsstýrið sum vanligur tulkingarmyndugleiki metir, at serlig lóggáva á einum øki skal takast fram um generella lóggávu. Tí er nevndin samd um, at tað er neyðugt við einari nágreining í djóravælferðarlógini, soleiðis at ongin ivi er um, at veiða og fiskiveiða eru ikki fevndar av djóravælferðarlógini.

Vit hava sæð, at djóraverndarfelagsskapir, ið vilja hava føroyingar at gevast við at drepa grind, nýta djóravælferðarlógina sum amboð at røkka sínum málum, hóast lógin ongantíð varð ætlað at umfata grindarakstur og grindadráp, ið eru fevnd av grindalógini.

Hetta er ein óheppin støða, og tí er ein nágreining neyðug fyri alla veiðu.

Ivasamt er, um tað fer at bera til at drepa grind í Føroyum frameftir, um djóravælferðalógin skal galda, og ikki grindalógin, sum er ein neyv regulering, ið tryggjar, at grindadráp verður framt so skjótt og skynsamt sum gjørligt.

Undir nevndarviðgerðini er upplýst, at henda lógarbroyting, um hon verður samtykt, fer at hava ávirkan á møgulig mál, sum eru til viðgerðar hjá myndugleikum, sum virka í Føroyum. Hetta kemst av, at sambært revsilógini skulu møgulig eldri lógarbrot, sum ikki eru avgjørd, metast eftir nýggju lóggávuni, um nýggjara lóggávan ikki førir við sær eina harðari avgerð enn tann fyrra.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 15. mai 2026

Ben Arabo formaður	Atli F. Johansen næstformaður	Fía Selma Nielsen
Erhard Joensen	Árni Skaale	Eirikur í Jákupsstovu
	Steffan Klein Poulsen	